## Kikjukonsert í Fuglafirði sunnudagin

Komandi sunnudag verður kirkjukonsert í Fuglafjarðar kirkju klokkan sekstan. Tað eru kór í Eysturoynni, ið syngja. Kirkjukórið í Friðrikskirkjuni, kórleiðari Mikael J. Heinesen. Kór Glyvra kirkju, kórleiðari Meinhard Bjartalíð. Kórið hjá Jóhan, kórleiðari Jóhan Mortensen. Eystanljóð(Gøta/Leirvík), kórleiðari, Petur Martin Johannesen. Fuglafjarðar sangkór, kórleiðari Frits Johannesen. Einir 150 sangarar vera við í hesum átaki. Kórini syngja sálmar, várløg og klassisk løg við t. d. orgulfylgisspæli og trompet, og tey syngja bæði einsæ



# Loypur saman umborð á Smyrli

**Hóast Smyril er nýggjur, kemur tað meiri enn so fyri, at hann longu er ov lítil. Hinvegin er tað eisini ein trupulleiki, at ferðafólk við bili eru ov sein til skipið**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tá ið Smyril varð bygdur, varð sagt, at hann skuldi nøkta tørvin á flutningi til og úr Suðuroy langt fram í tíðina.

Í allarflestu førum er tað heldur ongin trupulleiki. Kortini kemur tað meiri enn so fyri, at hann longu er ov lítil, so at bilar standa eftir á bryggjuni.

Bara í farnu viku hendi tað tvær ferðir, at bilar standa eftir.

Á Strandferðsluni eru tey greið yvir trupulleikan og umhugsa nú, hvussu hann kann loysast.

Tað liggur so í øllum førum fast, at sum støðan er nú, verður ikki talan um at hann fer at sigla fleiri túrar, tí tað er ongin játtan til.

Hinvegin fer Strandferðslan nú at laga ferðaætlanina til og at gera onkrar broytingar fyri at lætta um trupulleikan.

Jens Petur Brattalíð, ferðslusamskiparin, sigur, at eitt, sum ger seg galdandi, er at Skipafelagið er hildið uppat at sigla upp á Suðuroy og tað ger, at allur farmur til og úr Suðuroy nú skal við Smyrli.

Sostatt er nøgdin av Farmi vaksin ógvuliga nógv.

Samstundis er væntandi, at enn fleiri farmur verður at flyta í summar, tá ið alivinnan í Suðuroy fer at taka laks

Jan Haldansen, leiðari á Sjódeildini, sigur, at tá ið nógvur farmur er við, blokerar tað fyri hyllunum, tí fyri tryggleikan hjá skipinum kann allur tann tungi flutningurin ikki flytast út í borðið.

- Sostatt er viðhvørt neyðugt at seta treylarar og bingjur inn ímóti keysingini og tá fáast hyllarnar ikki niður og tá sleppa sjálvsagt nógv færri bilar við.

Hinvegin staðfestir hann eisini, at summi av teimum, sum ikki sleppa við, eru ferðafólk við bili, sum eru ov sein til skipið.

- Tað stendur í ferðaætlanini, at fólk við bili skulu vera á bryggjuni í seinasta lagi eitt korter áðrenn skipi siglur fyri at manningin kann leggja til rættis, hvussu skipið skal lastast.

- Men tað kemur meiri enn so fyri, at bilar koma til skipið nógv seinni enn tað og tað elvir til trupulleikar, sigur Jan Haldansen.



*Tað kemur meiri enn so Smyril er ov lítil so at bilar standa eftir á bryggjuni. Nú verður ferðaætlanin lagað til og Strandferðslan vónar, at tað fer at hjálpa*

### Nýggj ferðaætlan

Í eini roynd at bøta um støðuna og fyri at rætta aðrar skeivleikar, fer Smyril at broyta ferðaætlan tann 15. mai.

Tá verður talan um broytingar ávísar dagar um vikuna, sigur Jens Petur Brattalíð.

Ein broyting er, at mánadag og mikudag siglur Smyril nú úr Havn klokkan 13.30, men tann verður er flutt til klokkan 16.

Tað er fyri at tað skal bera til at fáa so nógvan farm sum gjørligt við hendan túrin ístaðin fyri at lata alt bíða til kvøldtúrin.

Eftir galdandi ferðaætlanin siglur hann so úr Suðuroy aftur klokkan 18.30 og tað er óbroytt, men fráferðin suðuraftur klokkan 20.30, er flutt til klokkan 21, tí tað hevur gingið illa at halda ferðaætlanina um kvøldið.

Fríggjamorgum fer Smyril at sigla av Krambatanga klokkan sjey alt árið og ikki klokkan seks helvtina av árinum, sum nú.

Leygardag er eisini ein broyting, tí tá siglur hann suður klokkan 15.30, men tann ferðin verður flutt til klokkan 16.

Hetta er fyri at geva ítróttarfólkið úr Suðuroy eina løtu afturat í Havn.

Hinvegin er kvøldtúrurin leygarkvøld, sum er klokkan 21, fluttur fram til klokkan 20.30.

### Stabilisatorarnir virka fínt

Annars hava leysasøgur gingið um, at stabilisatorarnir á Smyrli eru óvirknir í løtuni, men tað avsannar Strandferðslan.

-Teir virka fínt. Hinvegin hava vit eftirkannað teir í seinastuni, men tað hevur bara verið vanligt eftirlit, sigur Jan Haldansen.

# Donsk lýsingabløð ólóglig í Føroyum

**Allir limirnir í Løgtinginum eru samdir um, at alt lýsingatilfar, sum beinleiðis er ætlað brúkarum í Føroyum, skal vera á føroyskum máli og nú verður føroyski brúkarin eisini tryggjaður við brúkaraumboðsmanni**

BRÚKARAVERND
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í framtíðini verða øll útlendsk lýsingabløð ólóglig í Føroyum.

Í øllum førum eru allir tinglimir samdir um, at nú skulu føroyskir brúkarar bara fóðrast við lýsingum á føroyskum máli.

Í morgun hevur Løgtingið viðgjørt ikki minni enn tvey uppskot um marknaðarføringslóg.

Annað uppskotið hevur samgongan lagt fram og hitt uppskotið hevur andstøðan lagt fram.

Men í báðum uppskotunum verður nú skotið upp, at allar lýsingar og alt lýsingatilfar, sum beinleiðis vendir sær til føroyska brúkaran, skal vera á føroyskum máli.

Hetta ber í sær, at tekstarin í øllum lýsingum og lýsingatilfari, sum eru gjørt fyri at ávirka brúkarar í Føroyum, skal vera á føroyskum.

Men hinvegin hevði verið ov nógv at kravt, at andstøða og samgonga vóru púra samd um málið kortini, tí - sum vant- funnu tey okkurt at vera ósamd um.

Samgongan vil hava, at ein stovnur skal setast á stovn við einum brúkaraumboðið og tað ber í sær, at útreiðslurnar fyri at seta uppskotið í verk, fer at vera tvær milliónir krónur um árið.

Av tí sama skuldi hetta ikki koma í gildið fyrrenn 1. januar, tá ið fíggjarlógin fyri 2009 er komið í gildið.

Hinvegin mælti andstøðan til, at hetta skuldi umsitast av teimum eftirlitsmyndugleikum, sum longu eru fyri at gera tað bíligari.

Av tí sama kundi uppskotið setast í verk beinanvegin.

Andstøðan stúrdi fyri, at verður uppskotið hjá samgonguni samtykt, er vandi fyri, at alt dettur á gólvið, tí andstøðan hevur ikki fult álit á, at peningur yvirhøvur fer at verða játtað til endamálið næsta ár.

Hinvegin førdi samgongan fram, at fyri at verja brúkaran, er tað heilt avgerðandi og harðliga tiltrongt, at vit fáa ein brúkaraumboðsmann.

Men tá ið Løgtingið atkvøddi um málið, varð tað uppskotið frá samgonguni, sum varð samtykt.

Sostatt verður føroyski brúkarin munandi betri tryggjaður frá 1. januar at rokna við einum brúkaraumboði, sum skal tryggja ávís rættindi hjá brúkarunum.

Og samstundis verður tað frá 1. januar at rokna, ikki lógligt at hjá handilsfólki og vinnurekandi at venda sær til føroyska brúkaran á øðrum máli enn føroyskum.

Tað var málnevndin, sum í síni tíð heitti á landsstýrið um at seta tiltøk í verk fyri at tryggja, at alt lýsingamál í Føroyum, skal vera á føroyskum máli.

Málið skal hava eina viðgerð í løgtinginum afturat, áðrenn tað er endaliga avgreitt, men tað er oftast bara ein avgreiðsluspurningur.